


*Tað er sum at trína inn í ein annan heim at koma inn í vínkjallaran hjá Hotel Føroyum. Myrkt, rátt og kølið liggja túsundavís av fløskum stáplaðar á hillum, sum røkka fleiri manshæddir upp*

# Himmiríki av Jesu

Perlandi døgg í duldum myrkri. Føroyingar hava veruliga fingið smakk fyri víni. Á Hotel Føroyum hava tey sett sær fyri, at tey um nøkur ár skulu hava ein hin størsta vínkjallaran í Norðurlondum

Í einum køldum kjallara við Oyggjarvegin, har ljósið er dimt og stillið drepandi, flýtur tað við blóði. Fløskur í túsundatali, fyltar við reyðum løgi, liggja stáplaðar á hillum, ið røkka fleiri manshæddir upp undir høga loftið. Skipaðar eftir navni, árgangi og upprunalandi. Í hølunum omanfyri sita annars siviliseraðir føroyingar og koyra í seg av myrkareyðu dropunum, sum verða settir á borðið við júst røttum hita.

Kjallarin liggur undir einum kendum føroyskum bygningi, har amerikanskir forsetar og týskar rokkstjørnur hava búð. Blóðið, sum vit tosa um, er ikki mannablóð. Seinastu 2000 árini hevur tað verið kent sum »Jesu blóð«. Við vanligum orðum verður tað rópt vín, og á Hotel Føroyum byggja tey í hesum døgum ein veruligur vínkjallara upp.

Jóhan Gardar Joensen, tænari á Hotel Føroyum, greiðir okkum frá um vínkjallaran, um vín, sjampanju og alt, sum tú hevur brúk fyri at vita um, tá tú fæst við og handfarir hendan gudadrykkin.

**Millum teir størstu í Norðurlondum**

Tú verður ikki vónbrotin, tá tú trínur inn í vínkjallaran.

Tað er ikki bara eitt goymslurúm, har fløskur liggja stáplaðar á eini rúgvu av vínhillum. Fyrsta tú kemur inn, fær tú eina varhuga av, at hetta er ein rættiligur vínkjallari.

Ljósið er dempað, luftin svallig, og báðumegin við standa himmalhøgar vínhillar, sum tilsamans kunnu rúma upp í 6000 vínfløskur. Á gólvinum standa tvær rættiligar Suðurafrikanskar víntunnur , sum kunnu nýtast til at seta eitthvørt á. Eisini er eitt serligt goymslustativ til sjampanjufløskur.

Luftin er eitt sindur slavin, og veggirnir svartir. Soleiðis skal tað vera. Vínið skal varðveitast í røttum ljósi, hita og við røttu vætuni í luftini.

Jóhan Gardar Joensen greiðir frá, at tað í løtuni liggja um 1500 fløskur í kjallaranum. Hesar umboða millum 120 og 130 ymisk sløg av víni. Men at tá kjallarin veruliga kemur upp at koyra, kann hann rúma upp í 6000 fløskur. Eisini er ætlanin at koma upp móti 800 ymisk sløg, tá verandi kapasitetur verður fult útnyttaður. Tá verður hann